

# Ráðgivið Clinton og Obama – skal nú undirvísa á Setrinum

**Jan Müller**

26.05.2015 - 19:58

Oljan.fo

*Dómari í altjóða dómstólinum í Haag skal undirvísa á Setrinum í summar*

Tað er einki minni enn ein stórhending, at ein dómari í altjóða dómstólinum í Haag, (ICJ) kemur at undirvísa á Fróðskaparsetrinum í summar. Tað munnu vera áratíggju, síðan ein ICJ dómari seinast hevur undirvíst á einum norðurlendskum lærustovni, og tað er heldur ikki gerandiskostur, at dómarar í altjóða dómstólinum í Haag átaka sær slíkar frálæruuppgávur.

Tað er tó eydnast í sambandi við landgrunsskeiðið "Summer Academy on the Continental Shelf" (SACS), sum í ár verður hildið á Setrinum í døgunum 22. - 27. juni. Talan er um Judge Joan Donoghue, ið er amerikanskur ríkisborgari.

Í altjóða dómstólinum í Haag sita 15 dómarar, ið eru valdir fyri eitt 9 ára tíðarskeið. Ein slík útnevning inniber m.a., at bæði Trygdarráðið og Aðalfundur Sameindu Tjóða skulu taka undir við henni.

Judge Donoghue hevur verið dómari í Haag, síðani september 2010. Áðrenn hon gjørdist altjóða dómari, var hon ovasti løgfrøðiligi ráðgevi í amerikansku uttanríkistænastuni, har hon ráðgav Hillary Clinton og Barack Obama í øllum altjóðarættarligum spurningum.

Tilsamans 30 fólk úr 20 ymiskum londum, harímillum lesandi, granskarar og embætisfólk, luttaka á ársins SACS, og ikki minst er tað at frøast um, at fleiri føroyingar eru ímillum luttakararnar.